## Størsti fólkavøkstur í 5 ár

Fólkatalið varð uppgjørt til 48.678 tann 1. juli 2008. Hetta eru 231 fleiri enn árið fyri og 274 fleiri enn við ársbyrjan. Hetta er tann størsti fólkavøkstur eitt hálvár síðani 2003. Fólkavøksturin í Føroyum er mestsum altíð størstur fyrra hálvár. Seinastu fýra árini hevur vøkstur verið í fólkatalinum fyrra hálvár, men minking seinna hálvár. Hetta hevur so aftur havt við sær, at fólkatalið bert er vaksið við stívliga 250 fólkum í tíðarskeiðinum 1. juli 2004 til 1. juli 2008. Tal á føddum og deyðum er rættiliga støðugt í Føroyum, so tey hálvárligu sveiggini stava frá flytimynstrinum. Flytingin í Føroyum er lutfalsliga stór, og hon ávirkar fólkatalið meira enn dupult so nógv sum talið á føddum og deyðum. Ein stórur partur av flytingini er í samband við útbúgving, so fráflytingin er altíð størst seinna partin av summarinum. Tilflytingin hinvegin er vanliga størst fyrst á sumri, skrivar Hagstovan á heimasíðu síni.

# Dansihøll møguliga rívast niður

**Fundur verður í vikuni millum Dansifrøi og Tórshavnar býráð um speglvenda bygningin**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Byggingin av hølunum hjá Dansifrøi varð steðgað herfyri, tí bygningurin ikki var í tráð við tekningarnar. Hann er bygdur speglvent av tekningunum, og tí verður neyðugt at finna eina loysn, so samsvar er millum tekningar og bygning.

Fundur verður seinni í vikuni millum Dansifrøi og Tórshavnar býráð um viðurskiftini, og ikki fyrr enn tann fundurin hevur verið, ber til at siga nakað nærri um, hvør loysnin á málinum verður.

Sambært Dimmalætting vísir borgarstjórin á tvær møguligar loysnir. Onnur er, at tekningarnar verða broyttar, so tær samsvara við bygningin, og hin er, at bygningurin verður stoyptur av nýggjum eftir uppruna tekningunum.

Høgni Mikkelsen, sum situr í bygginevndini fyri Dansifrøi, vil ikki siga nakað meiri um málið fyrr enn fundurin millum felagið og kommununa hevur verið.

Tað verður eisini neyðugt at leggja málið fyri Byggi- og býarskipanarnevndina, sum skal góðkenna byggingina av nýggjum.

Tað hevur ikki borið til at uppspurt, um talan er um ein reguleran feil, ella um bygt er speglvent av tekningini við vilja.




*Lagnan hjá húsunum hjá Dansifrøi verður helst avgjørd á fundinum millum Dansifrøi og kommununa seinni í vikuni*
*Mynd: Leo Poulsen*

# Maddie-sagain heldur fram

*Fleiri halda seg hava sæð horvnu Madeleine McCann, men hendan fráboðanin verður tikin í álvara av belgisku løgregluni*



**Enska blaðið, Daily Express, veit í dag at siga, at ein bretsk genta, sum líkist Madeleine McCann, bønaði um at sleppa heim**

BURTURFLYTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Belgiska løgreglan kannar nú upptøkur av vevkamera í einum banka í Brüssell. Á myndunum sæst ein genta við ljósum hári, fangað av vevkameranum fyri bara sjey døgum síðani.

Belgiska løgreglan sigur, at málið hevur fingið hægstu raðfesting, og gjølligar kanningar eru settar í verk.

Tað var ein trygdarvørður, sum varnaðist lítlu gentuna, sum »líkist ógvuliga nógv« Madeleine, í Havenlaan deildini hjá KBC Banka í Molenbeek St. Jean økinum.

Leiðandi eina Norðurafrikanska arabiska kvinnu var hon fangað á ikki færri enn sjey ymiskum vevkameraum.

Tær báðar vóru sæddar gangandi runt í bankanum seinasta mánadag, og síðani gingu tær mótvegis arabiska býarpartinum í Brüssell. Á bondunum hoyrist gentan krevja á enskum: »Eg vil sleppa heim aftur«.

Myndirnar eru sambært Daily Exrpess ógvuliga klárar.



*Dollarin styrknar nú aftur mótvegis yuan'inum, og tað er ikki gott fyri amerikanska gjaldsjavnan*

# Styrktur dollari skaðar gjaldsjavnan hjá USA

**Seinastu trý árini er dollarakursurin viknaður 18% mótvegis kinesiska yuan'inum**

HANDIL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Lækkaði dollarakursurin mótvegis yuan'inum hevur merkt størri og størri kappingarevni, men tykist, sum vend er komin í.

Dollarakursurin er síðani miðskeiðis í juli hækkaður 0,77% í mun til yuan'in. Talan er um størstu og longstvarandi hækkingina í trý ár. Ein dollari svarar í dag til 6,8623 yuan.

Hendan broytingin í valutakursunum er langtfrá nakar ynskidreymur hjá amerikanarunum, tí teir berjast við ógvusligt og hækkandi undirskotá gjaldsjavnanum.

Kursbroytingarnar merkja, at tað aftur verður bíligari hjá amerikanarum at keypa kinesiskar vørur, meðan tað mótsatt er støðan hjá kinesarunum. Hendan gongdin kann fáa amerikanska gjaldsjavna undirskotið at vaksa enn meiri.